# Um Axel Dalsgaard



*Astrid (1905-1985) og Aksel (1901-1980) Dalsgaard.*

Axel Dalsgaard (1901-1980) var vanliga nevndur Axel á Mølini. Hann var sonur handilsmannin Waldemar á Mølini (1866-1951), ið var Dalsgarðssonur. Kona hansara var Sunneva úr Búri í Skopun (1872-1947).
Kona Axel, Astrid (1905-1985) var ættað úr Skopun. Børnini hjá teimum vóru Borghild, Palli, Valdemar, Tønner, Eyðstein og Ásla.

Axel var bilførari á fyrsta bilinum, sum kom til oynna í 1923, kommunan átti bilin. Tá var øll oyggin ein kommuna. Mesta koyringin tá mundi vera postflutningur eftir oynni, sum kommunan hevði ábyrgdina av. Tey fyrstu árini búði Axel á Sandi. Í 1927 bygdi hann hús í Skálavík og flutti hagar at búgva. Hann gavst at koyra hjá Sanda kommunu fyrst í 30-unum og var av og á til skips, men var annars heimamaður.
Tá ið vegmenninir blivu settir um landið, ein til hvørja kommunu varð hann vegmaður fyri Skálavík. Hetta arbeiði hevði hann til miðskeiðis undir seinna kríggi. Tá ið Sands kommuna segði postflutningin frá sær, fekk hann postin aftur at flyta millum bygdirnar inntil tað almnena yvirtók hendan flutning. Hansara seinastu arbeiðsár var hann flekjari í Føroyingahavnini í Grønlandi.
Júst henda frásøgnin er eitt gott dømi um frásagnir, sum liggja, og sum ikki eru komnar fram alment. Tað er soni Axels Palla fyri at takka, at hetta íkastið til okkara fiskimannasøgu nú kemur fram. Takk skal hann hava fyri tað.
Hóast frásøgnin um ferðina hjá Niels R Finsen ikki eru ókend, so eru í hesi frásøgn greitt frá viðurskiftum, sum ikki hava verið frammi fyrr.

hendurnar á honum. Hann hálaði í hann men fekk tað ikki at standa á. So tók hann og vavdi endan um vinstra arm, gjørdi eitt lítið stikk á og helt so við høgru hond. Til endan stóð á.
Tá skjeyt Hans Pauli upp úr sjónum. So djúpt lá skipið tá, at einki var undankomið av afturskipinum, men hann fekk hálað seg inn aftur og umborð.

## Várharra setti ongan eftir, men tað gjørdi skiparin

Skiparin roknaði við, at skipið var farið at leka, og ætlanin var upprunaliga at fara inn á Reykjavík. Men tá tað var liðið eitt sindur frá vísti tað seg, at skipið lak ikki, hóast tað sum so var illa farið. Alt riggaði sum tað skuldi. Tískil varð avrátt saman við øllum umborð at seta kós móti Føroyum. Tað var sera stríggið tá, men man var so mikið ungur, at tað bilti ikki. Teir høvdu júst so mikið av mati hjá sær, at hann skuldi strekkja, so sum keks og margarin. Men nógv av matinum var blivin vátur, og tað gjørdist eisini svangligt sum frá leið.
Axel greiðir frá: "Hovmeistarin kókaði einar tvær ferðir kakao til okkara.
Skiparin skonkti snaps til matrósarnar, tá ið tað ringasta var av. Hetta hildu vit vera løgið, tí okkum leskaði hann ikki. Vit vóru einir 10 føroyingar, sum høvdu verið við á dekkinum. Eg fór til hovmeistaran at spyrja, um hann hevði eina fløsku. Hann bað meg trúgva sær, at hann átti hana ikki, men hann bað meg fara til skiparan.
Men tað tímdi eg ikki, tí eg hevði sæð hvørjum hann hevði skonkt fyri. Sigast kann, at næst eftir Guds hjálp, so áttu vit líka stóra æru sum teir fyri, at vit komu burtur úr tí.
Vit vóru á Havnini 24. oktober. Tað var ringt veður heim. Tað vóru eini 10 vindstig í eini tvey samdøgur. Vit líka sum fylgdust við óveðrinum. Men annars var eingin vandi".
St Jaques kom eisini heim í hesum veðrinum. Hann var eisini um Kappaleiðina. Teir høvdu eisini ringt veður, men fingu tó ongan skaða.
Justines í Oyndarfirði var við til Grønlands við Niels R Finsen, og hann var eisini við nú. Tað segðist, at hann var ísloðsur.
Tað segðist eisini, at hann hevði skipað fyri at fara upp við Eysturgrønland av ótta fyri kavbátum.
Justines segði annars, at teir høvdu ikki borið boð í bý, høvdu teir ikki havt hesar mongu røsku útróðrarmenninar umborð.
Inntøkan fyri árið var 150 kr. Høvdu annars roknað við kr. 250, sum eisini vildi verið vánaligt. Tá var eingin minstaløn, so hetta gjørdist eitt soltið summar.



*Niels R. Finsen við kei í Havn aftaná hesa hættisligu ferðina*

## Trupulleikar við trygging

Tryggingarnar, sum høvdu við hesa ferð at gera, fingu úr at gera. Tað tók sína tíð at fáa teir spurningar greiddar. Men her stóðu so nógvir útróðrarmenn bátleysir, og okkurt mátti gerast.
Heitt varð á tingið um annaðhvørt at veita studning, lán ella veðhald til at keypa bátar fyri teir, sum teir høvdu mist. Tað vóru 8- og 10, mest 10-mannafør, og kostaðu millum 2.500 og 4.000 krónur hvør. Hetta vóru fleiri ársinntøkur tá í tíðini.
Útróðrarmenninir gingu út frá, at bátarnir vóru tryggjaðir, men vistu ikki, fyri hvussu nógv, og ei heldur, nær hesin peningur varð tøkur.
Løgtingið helt seg ikki kunna ganga áheitani á møti, men samtykti tríggjar vikur seinni at áleggja landsnevndini at eygleiða málið, og at veita umsøkjarunum neyðuga hjálp.

## Aftaná kríggið

Føroyingar byrjaðu so smátt aftur at rógva út frá landi í Grønlandi í 1949, og í 1950 var byrjað í Føroyingahavnini. Tann fyrsti samskipaði útróðurin aðrastaðni var aftur i Ravns Stóroy og Tovqussak í 1952. Útróðurin helt á fram í 60-ini ella kanska fyrst í 70-ini. Tá var henda tíðin av.
Fullfíggjaða søgan um hesa tíðina er í bókarøðini Teir tóku Land hjá Niels Juel og Jógvan Arge.



*Teir rudda upp á dekkinum á Niels R Finsen við keiina í Havn*

Sosialurin